## Føddi áttalingar

Ein kvinna í USA hevur føtt ikki færri enn átta børn á einari føðistovu í Kalifornia. Ella rættari sagt, fýra føðistovur vórðu nýttar til føðingina, og ikki færri enn 46 læknar, sjúkrasystrar og jarðamøður vóru við til føðingina. Mamman, sum enn er ónevnd, føddi seks dreingir og tvær gentur, sum vigaðu millum 820 gramm og 1500 gramm. Hetta er bert aðru ferð í amerikansku søguni, at ein kvinna hevur føtt átta livandi børn í senn. Læknarnir høvdu roknað við sjey, og gjørdust tí bilsnir, tá hin áttandi nýføðingurin eisini kom til verðina. Tað visti sjónvarpsstøðin Sky News at siga.




*Læknarnir Karen Maples, Harold Henry og Mandhir Gupta á tíðindafundinum á Kaiser Permanente Bellflower Medical Centre, har føðingin fór fram*

# Fimleikahøll til tíðina

**3. november varð spakin settur í við Tórsvøll til nýggju fimleikahøllina í Havn. Arbeiðið er sett at taka 18 mánaðir, og enn gongur alt eftir ætlan**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú er slutt við føgrum orðum. Nú er verulig gongd komin á bygging av nýggjari fimleikahøll í Havn, nakað, sum bíðað hevur verið eftir í áratíggju.

3. november í fjør varð spakin settur í uppi við vestara enda av Tórsvølli, og nú gongur arbeiðið sum eftir ánni.

- Spakin var gamaní settur í fyrst í november, men arbeiðið er ikki veruliga farið í gongd fyrr enn nú í nýggja árinum. Teir hava so nýtt tíðina fram til 1. januar at etablera arbeiðsplássið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Talan verður um kollveltandi betringar fyri fimleikin í høvuðsstaðnum, tá høllin um hálvt annað ár verður klár at taka í nýtslu. Talan verður um umstøður, sum lúka altjóða krøv, og fasilitetirnir verða í topp.

- Høllin verður býtt upp í tríggjar hallir, men veggirnir kunnu flytast, so talan verður um eina stóra høll. Trý rútmisk gólv verða og ein permanent reiðskapshøll. Flytbar áskoðarapláss verða eisini við plássi til 416 áskoðarar, umframt onnur áskoðarapláss, so samlaða áskoðaratalið fer at liggja um 500, sigur borgarstjórin.

### Ítróttadepil

Nýggja fimleikahøllin kemur at liggja mitt í ítróttaøkinum í Gundadali við svimjihøllini, ítróttahøllunum og fótbóltsvøllunum sum nærmastu grannum.

Ætlanin er, at bygningurin skal fella væl inn í landslagið, og á síðuni,m sum vendir út móti Tórsvølli, skulu áskoðarapláss gerast. Somuleiðis skal gerast ein pallur út móti Tórsvølli, sum skal kunna nýtast til ymisk tiltøk, sum tikl dømis konsertir og framsýningar.

Eystursíðan verður í tveimum hæddum við einari balkong, har síggjast kann út yvir tær tríggjar hallirnar. Vestan fyri høllina er ætanin – tó ikki í fyrstu syftu – at gera eina atgongumerkjasølu, sum samstundis skal vera café.

Tað eru tvey fimleikafeløg í Tórshavn, Havnar Fimleikafelag og Fimleikafelagið Ljósið.

MT Højgaard stendur fyri byggingini.



*Eftir at MT Højgaard nýtti seinastu mánaðirnar av 2008 at etablera arbeiðsplássið, hevur verið arbeitt støðugt síðani nýggja árið byrjaði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Súni Olsen dømdur 50 daga fongsul

**Kendi føroyski landsliðsleikarin, Súni Olsen, varð í Føroya Rætti í dag dømdur 50 daga fongsulsrevsing fyri í september í fjør at hava sligið ein duravørð. Serliga umstøður gjørdu tó, at revsingin er treytað**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein býtúrur í september í fjør hevur nú fingið ta avleiðing fyri føroyska landsliðsleikaran, Suna Olsen, at hann er dømdur í 50 daga fongsulsrevsing fyri at hava sligið ein duravørð.

Hendingin fór fram 7. september í fjør, tá Súni Olsen eftir gott lag við vinmonnum endaði í Eclipse. Har sóu tveir duravørðar eftir øllum at døma landsliðsleikaran so illan og óhøviskan, at teir gjørdu av at tveita hann á dyr.

Dómarin legði til grund, at hóast ósamsvar á fleiri punktum var í frágreiðingunum, mátti staðfestast, at Súni Olsen hevði sligið annan av duravørunum so harðliga, at ein hann brákaði eina tonn.

Dómarin valdi tí at ganga ákæranum á møti og døma landsliðsleikaran í 50 daga fongsul. Men hann var kortini ikki samdur við ákæranum um, at dómurin skuldi verða treytaleysur.

Í grundgeving síni førdi dómarin fram, at ósamsvar er millum frágreiðingarnar hjá duravørðunum, og hartil førdi eitt annað vitni fram, at duravørðarnir vóru bæði harðligir og ósømiligir. Eisini taldi tað við, at Súni Olsen var í østari sinnisstøðu, umframt at hann ongantíð hevði verið úti fyri slíkum áður.

Dómarin gjørdi tí av, at fongsulsrevsingin skuldi verða treytað, og fellur burtur, um Súni Olsen einki revsivert ger tvey tey komandi árini.

So hóast Súni Olsen nú má liva við at verða dømdur fyri harðskap, so sleppur hann kortini undan at fara inn at sita revsingina av sær.

Jógvan Páll Lassen hevði ikki fingið sjálvan dómin, tá vit tosaðu við hann beint eftir døgurða, men bert hoyrt úrslitið. Støða er tí ikki tikin enn til, um dómurin verður skotin inn fyri hægri rætt. Men sambært verjanum verður støða tikin til hetta innan heilt fáar dagar.



*Súni Olsen varð í dag dømdur fyri harðskap – men sleppur kortini undan at sita dómin á 50 dagar, um hann einki revsivert ger í tvey ár*